# Áland hevur besta skúlan í heiminum

**Mentamálaráðharrin úr Àlandi, Camilla Gunell, er í døgunum á vitjan í Føroyum. Hon kemur, nú kjakið um føroyska skúlan leikar á sum harðast. Àland, ið er partur av Finlandi, hevði best úrslit í øllum heiminum í Pisa-kanningini.**

VITJAN
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Camilla Gunell(s) er í Føroyum fyri at kunna seg um føroysk útbúgvingar-, granskingar- og mentanarviðurskifti.

Hon smílist tá Pisa-kanningin verður nevnd.

– Eg veit ikki, hvat vit gera rætt á Álandi, og hvat tit gera galið her í Føroyum. Men finska skúlaskipanin, sum vit fylgja, er øgiliga rættað ímóti úrslitinum og ikki so persónliga mennandi. Tað kann vera, at tykkara skipan er betri til at menna persónligheitina hjá næminginum - og ikki líka sterk fagliga, sigur Camilla Gunell.

Nú koma lond úr øllum heiminum til Finland at læra seg um teirra skúlaskipan, og hvat tey gera rætt, sum hava fingið so flott úrslit í Pisa-kanningini.

– Eg haldi, at tit ikki skulu taka hetta úrslit so tungt, uttan seta tykkum niður og greina kanningina og úrslitið, áðrenn tit gera naka, sigur Camilla.



*Jógvan á Lakjuni og Camilla Gunell.*

### Nógvur peningur

À Álandi verður nógvur peningur hvørt ár brúktur uppá barnaumsorgan og skúlan. Børnini byrja í skúlanum, tá tey eru sjey ár, og ganga níggju ár í fólkaskúlanum. Aftaná tað fara heili 97 prosent av næmingunum víðari á student.

– Vit hava sum mál, at tá næmingarnir eru lidnir við student, skulu tey fara á hægri skúlar uttanlands og á Álandi. Umleið 500 fara til Svøríkis, 200 til Finlands og 200 verða verðandi á Álandi, sigur Camilla Gunell.

À Álandi hava tey sjómansskúla, hotell og restaurantskúla, sjúkrasystraskúla, landbúnaðarskúla, eitt minni fróðskaparsetur og ein háskúla. Tey, sum vilja læra til lærara, mugu fara uttanlands.

– Umleið 70 prosent at øllum lærarum á Álandi hava nomið sær útbúgving í Svøríki, sigur Camilla.

Fyrr hava tey haft trupulleika av ov fáum útbúnum lærarum, men nú er vend komin í, og tá søkt verður eftir lærarum nú, eru tað næstan bara fólk við læraraútbúgving, sum søkja.

### Fáa fólk heimaftur

Eftirsum so nógv fólk fara uttanlands at nema sær útbúgving, hevur Áland sama trupulleika sum Føroyar við tí so kallaða »brain drain«. Vælútbúgvin fólk velja at verða verandi uttanlands, og koma ikki heimaftur aftaná lokna útbúgving.

Men har hava tey valt eina aðra loysn enn føroyingar.

– Vit kunnu ikki kappast við Stockholm og Helsingfors í mentannarútboði og býarlívið. Tí velja vit at kappast, har vit kunnu - og tað er á skúlaøkinum. Vit brúka nógvar pengar uppá at hava bestu barnaumsorgan og skúlan, og tað er nakað sum lokkar fólk heimaftur til Álands, sigur Camilla.

### Nógv felags

Føroyar og Áland liggja langt frá hvørjum øðrum landafrøðiliga, men hava nógv til felags, eftirsum bæði lond eru sjálvstýrandi partar av einum øðrum landi.

– Nógv av tí, sum eg tosið við tey á Mentamálaráðnum um, eru trupulleikar, ið vit eisini hava á Álandi.

Yvonne Eriksson, sum er deildarstjóri nikkar eisini, og sigur at hon hevur haft nógvan stuðul úr Føroyum, og at áhugamálini ofta eru tey somu í Føroyum og á Álandi.

ìgjár vóru Camilla og Yvonne á vitjan í Fróðskaparsetrinum og á Sjómans- og Maskinmeistaraskúlanum. ìdag skulu tær báðar ein tyrlutúr til Stóra Dímun og til skúlan í Skúvoy millum annað.

# Grand Prix veitslan byrjar í kvøld

**Heili 37 lond kappast í ár um at gerast besti sangfuglur í Evropa. Hetta hevur við sær, at ein hálvfinala verður í kvøld, har tíggju lond av 23 skulu veljast út til finaluna leygarkvøldið**

TÓNLEIKUR
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Tey 23 londini komu ikki millum tey fjúrtan bestu í kappingini í fjør, og tí eru tey noydd at kappast í eini undankapping fyri at koma við til finaluna.

Danmark er longu klárt til finaluna eftirsum Jakob Sveistrup kom nummar 10 í fjør, men Svøríki, Finnland og Ísland eru øll við í hálvfinaluni íkvøld.

Svøríki hevur sent kendu Carolu til Aten. Hon hevur kappast tvær ferðir fyrr fyri Svøríki og vunnið einaferð. Fyrstu ferð var við sanginum »Fræmling« í 1983, tá hon einans var 16 ár. Tá kom hon á triðja plássið, men sangurin gjørdist ein ræ ttulig landaplága. Aðru ferð hon var við, var við sanginum »Fångad av en stormvind« í 1991 og tá vann hon kappingina.

Í ár skal Carola syngja sangin »Invincible« og nógv tippa at hesin sangur verður millum teir fremstu í kappingini.

### Trøll úr Finlandi

Finnland plagar ikki at klára seg so væl í Grand Prix. Fleiri ár hevur landið verið aftast. Í ár kann ein ikki umgangast sangin frá Finnlandi. Tey hava nevnliga sent fimm trøll til Aten. Tað er harðrokkbólkurin Lordi, ið eru klæddir í ódjóraklæði og syngja sangin »Hard rock hallelujah«. Ljóðar kanska sum ein ræðusøga, men tá teir norðurlensku Grand Prix serfrøðingarni skuldu siga sítt um sangirnar í ársins kapping fekk sangurin hjá Finlandi flest stig. So kanska er tað hetta, sum skal til fyri at Finland skal vinna.

### Ringur atburður

Ísland hevur eisini verið í anglettinum í Athen. Tey hava sent Silviu Nótt við sanginum »Congratulations« Undir venjingunum og á tíðindafundunum hevur Silvia havt øguliga ringan atburð. Hon hevur bannað illa, fornermað tíðindafólkini og verið sera dømandi móti sínum kappingarneytum. Tað hevur til og við verið so ring at slatur hevur gingið um, at um Silvia ikki bøtir um atburðin er vandi fyri, at Ísland verður koyrt úr kappingini.

Sjónvarp Føroya sendir ikki undankappingina, men tað ger harafturímóti DR1.

Tey, sum tey serkønu meta hava stórstan møguleika at koma til finaluna er Írland, Holland og Svøríki.



*Svenska Carola kappast í kvøld um at koma í finaluna leygarkvølidið*

## Her eru londini sum kappast um tey 10 finaluplássini.

01. Armenia: Andre, Without your love
02. Bulgaria: Mariana Popova, Let me cry
03. Slovenia: Anzej Dezan, Plan B.
04. Andorra: Jennifer, Sense tu
05. Hvítarussland: Polina Smolova, Mama
06. Albania: Luiz Ejlli, Zjarr e ftohte
07. Belgia: Kate Ryan, Je t'adore
08. Ìrland: Brian Kennedy, Every song is a cry for love
09. Kypern: Annette Artani, Why angels cry
10. Monaco: Séverine Ferrer, La coco-dance
11. Makedonia: Elena Risteska Ninanajna
12. Póland: Ich Troje, Follow my heart
13. Russland: Dima Bilan, Never let you go
14. Turkaland: Sibel Tüzün, Superstar
15. Ukraina: Tina Karol, I am your queen
16. Finland: Lordi, Hard rock hallelujah
17. Holland: Treble, Amambanda
18. Litauia: LT United, We are the winners
19. Portugal: Nonstop, Coisas de nada
20. Svøríki: Carola, Evighet
21. Estland: Sandra Oxenryd, Through my window
22. Bosnia & Hercegovina: Hari mata hari, Lejla
23. Ísland: Silvia Nótt, Til hamingju Island

## Mentamálaráðið tekur ávaringarnar aftur

**Í gjár, mikudagin, sendi Mentamálaráðið út tíðindaskriv, har boðað varð frá, at ávaringarnar, sum nakrir lærarar á Studentaskúlanum og HF-skeiðunum í Hoydølum fingu í oktober í fjør, eru tiknar aftur**

ÁVARINGAR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Hetta tí, at størsti taparin ósemjuni millum Mentamálaráðið og Yrkisfelagið hjá Studenta- og HF-lærarum, kundi verið næmingarnir, sum ikki fingu prógvið, orsaka av einum stríðið, sum teir óviljaðir eru vorðnir partur av.

Í stuttum snýr málið seg um, at við skúlaársbyrjan vóru tveir flokkar í Hoydølum yvirmannaðir. Hægst loyvda tal av næmingum í einum flokki er 24, men í tveimum málsligum studentaflokkum í Hoydølum var talið 26. Hetta vildi Yrkisfelagið ikki finna seg í, og tá tað heldur ikki riggaði at samráðast um eina loysn til málið, so fóru lærararnir í teimum báðum yvirmannaðu flokkunum í verkfall í tveir dagar. Hetta fingu lærararnir eina skrivliga ávaring fyri, og fingu at vita, at endurtók tað seg, so vóru teir vístir burtur úr starvinum. - Hetta meta vit at vera sera grovt, og tað kunnu vit als ikki góðtaka. Vit vildu hava hesar ávaringarnar tiknar aftur, og tað hevur Mentamálaráðið nú gjørt, staðfestir formaðurin í Yrkisfelag Studenta og HF-lærara, Hans Andrias Sølvará.

Jógvan á Lakjuni er landsstýrismaður í Mentamálum, og hann heldur seg hava handla rætt í málinum: Vit kunnu ikki liva við, at næmingarnir ikki kunnu fáa prógv í summar orsaka av einum stríðið teir í veruleikanum ikki eru partur av. Næmingarnir eru óskyldugir í stríðnum, men tað eru teir, sum merkja avleiðingarnar, og tað vil eg ikki. Nú var tað so drigið so mikið langt út, at eg metti, at tað vóru vit, sum vóru noyddir at geva okkum. Um tað so eru vit, sum hava mist andlit mugu onnur taka støðu til, heldur Jógvan á Lakjuni.